# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Arbeiða hart fyri at yvirliva

**Verður onki munagott gjørt nú, er vandi fyri, at virksemið hjá Kovanum verður flutt av landinum. Men vit geva ikki skarvin yvir við góðum, sigur Albert Ari Thomasen, stjóri**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Grundarlagið undir niðursjóðingarvirkinum, Kovanum, í Sandavági er farið at ridla.

Tað ásannar Albert Ari Thomasen, stjóri á virkinum.

Og hann staðfestir eisini, at hendir onki munagott nú, er vandi fyri, at tey verða noydd at flyta virksemið av landinum.

– Vit hava sáttmálar sum skulu haldast og fáa vit ikki ráværu, hava vit onki val.

– Men vit geva ikki skarvin yvir við góðum og vit stríðast ein harðan kamp fyri at fáa tað at bera til í Føroyum, leggur hann afturat.

Og tað vónar hann, fer at eydnast.

## Alt ov lítið av rognum

Men orsøkin til, at tað ikki gongur so væl hjá einasta niðursjóðingarvirki í landinum, er, at tað kemur alt ov lítið av rognum upp á land.

– Tá ið Kovin keypti mest av rognum, keyptu vit 600 tons um árið. Men í ár vórðu ikki meiri enn 280 tons av rognum avreidd og av teimum fekk Kovin góð 140 tons og onnur virki keyptu restina.

Albert Ari Thomasen sigur, at tað eru fleiri orsøkir til, at tað gongur so strílti at fáa rogn.

– Ein forklaring er, at skip hava fingið kryvjimaskinur umborð. Ein onnur forklaring er, at tað er ikki so nógvur toskur at fáa og at toskurin er smáur og hevur tí ikki so nógv rogn.

– Men fyri nøkrum árum síðani var prísurin eisini frægari.

Umframt rognini eru rækjurnar hin stóra framleiðslan hjá Kovanum.

– Vit hava keypt goymsluna hjá OC Joensen á Oyri, men tað eru vit líðug við fyrst í komandi ári og tá er seinasta rækjan virkað í Føroyum.

Stjórin sigur, at tey hava roynt at styrkja virkið við aðrari framleiðslu afturat rognunum, sum eru høvuðsframleiðslan, men tað kundi virkið gjørt alla aðrastaðni í verðini.

## Útlendingar umborð á skipini

Sjálvur heldur hann, at tað, sum manglar í Føroyum, er ein grundleggjandi hugburður til at gagnnýta fiskatilfeingið.

– Alla mína tí havi eg hoyrt um góðsking, men tað hendir bara onki, leggur hann afturat. Veruleikin er, at tey virkini, sum royna at fáa meiri burturúr fiskatilfeingium, eru tey, sum hava tað torførast, tí tey fáa ikki ráværu.

Sjálvur hevur Albert Ari Thomasen nøkur uppskot um, hvussu vit kunnu fáa meiri burturúr fiskatilfeinginum og um, hvussu meiri rogn kunnu fáast til høldar.

Ein uppskot er at arbeiða fyri at kryvja fiskin á landi. Ein annar máti er at finna tekniskar loysnir, so at tað ber til at taka rogn og innvølir, uttan at tað órógvar manningina ov illa.

Men so nevnir hann eisini ein triða møguleika, sum er meiri óvanligur.

Og tað er at fáa útlendingar umborð á føroysku skipini í rognatíðini at taka rognini.

– Hetta skulu vera útlendingar, sum ikki skulu vera partur av manninginI sum so, men sum bara skulu hava til arbeiðis at kryvja og taka rogn.

Tað heldur hann avgjørt hevði loyst seg fíggjarliga.

– Rognini eru eini 5% av fiskinum. Og ein túr kann ein partrolari saktans fáa 100 tons av fiski. Sostatt fær hann fimm tons av rognum.

Avreiðingarprísurin er átta krónur fyri kilo. Sostatt fær trolarin 40.000 krónur bara fyri rognini í ein túr upp á nakrar dagar.

– Skal tað ikki loysa seg, er tað onki, sum loysir seg, sigur stjórin á Kovanum.



*Kovin fær alt ov lítið av rognum og tí er vandi fyri, at tey verða noydd at gevast. Men Albert, Ari Thomasen, stjóri á Kovanum hevur nøkur hugskot um, hvussu meiri rogn kunnu fáast til høldar. Eitt uppskot er at fáa útlendingar umborð á skipini í rognatíðini*

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.




TÍÐARAVMARKAÐ STARV TIL KT-VERKÆTLAN

Hagstovan hevur sett sær fyri at smíða eina nýggja hagtalsliga virkisskrá. Hon skal veita okkum dagført yvirlit yvir fyritøkur og stovnar - hvar tey halda til, hvat tey takast við, hvussu stór tey eru osfr..
Vitanin um fyritøkurnar stavar fyrst og fremst frá skipanum hjá Toll- og Skattstovuni og Skráseting Føroya. Ætlaða telduskipanin skal vera stuðulin í arbeiðinum at vinda hagtalsligar upplýsingar burtur úr umsitingarliga upprunatilfarinum.

Okkum tørvar eitt fólk til at vera við til at snikka bygnað og dátustrukturar saman og til at forrita skipanina. Goymsluskipanin er Oracle og forritingin av brúkaramarkamóti verður at gera við Oracle Internet Developer Suite ella øðrum líknandi amboð.
Arbeiðið fer fram í samstarvi við KT deildina og hagfrøðingarnar á Hagstovuni.

Ongi serstøk krøv eru til útbúgving, men dentur verður lagdur á førleikar og royndir. Starvið er avmarkað til eitt ár og verður lønt eftir sáttmála millum avvarandi felag og Fíggjarmálaráðið.
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.novembur.
Vil tú vita meiri um starvið, so set teg í samband við Axel Nolsøe ella Berg Dam á Hagstovuni, telefon 352800.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO